# Álit

**í**

**løgtingsmáli nr. 117/2023: Uppskot til løgtingslóg um tøkugjald**

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 30. apríl 2024, og eftir 1. viðgerð tann 2. mai 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. mai 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Bakkafrost, Hiddenfjord, Mowi og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Uni Holm Johannesen, Karlot Hergeirsson og Annika Olsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í Føroyum er breið semja um, at alifyritøkurnar skulu rinda fyri virðismikla rættin at ala á teimum føroysku firðunum. Politiska avbjóðingin hevur kortini í mong ár verið at finna eina gjaldsskipan, sum ein breiður meiriluti av Løgtinginum kundi semjast um og sum er haldfør, støðug og kappingarfør, og sum er so lítið atferðarstýrandi sum tilber fyri vinnuvirksemið hjá alifyritøkunum.

Meirilutin umboðandi semjupartarnar heldur, undir verandi fortreytum, eina politiska langtíðarsemju við tvíliðaðari skipan, einari tøkugjaldsskipan og einum nýggjum serskatti, vera bestu loysnina. Avtalað er, at hetta verður galdandi fram til í minsta lagi 2032. Um heilt serlig viðurskifti taka seg upp, so fara flokkarnir at viðgera semjuna og skipanina í felag.

Hendan semjan hevur stóran týdning fyri samfelagið og vinnuna, tí alivinnan frameftir kennir treytirnar, sum hon skal virka eftir. Lógin um loyvisgjald á alivinnuna er broytt fleiri ferðir seinastu árini, og bara í hesum valskeiðnum hava fýra lógaruppskot verið í Løgtinginum um at broyta gjaldsskipanina hjá alivinnuni. Hetta er óheppið, tí politiska arbeiðslagið hevur verið ein avbjóðing hjá vinnuni, sum skal leggja arbeiði, ætlanir og íløgur til rættis fram í tíð.

Semjupartarnir halda, at ein veikleiki við verandi loyvisgjaldi er, at váðin at gera langtíðar sáttmálar fyri virkaðar vørur er lutfalsliga stórur. Við hesari semjuni minkar tann váðin munandi. Ovastu stigini í tøkugjaldsstiganum verða tikin burtur, so hægsta stigið er 7,5 prosent. Tað vil siga, at tá søluprísurin fyri eitt kilo av laksi er meira enn 15 krónur omanfyri framleiðslukostnaðin, hækkar avgjaldsprosentið ikki meira enn 7,5 prosent. Tað skapar grundarlag fyri liðugvørum, sum verða seldar við langtíðar sáttmálum, tí gjaldsskipanin er ikki stýrandi fyri, hvat alifyritøkurnar velja at gera við fiskin eftir, at hann er tikin.

Ein onnur broyting er, at grundarlagið undir framleiðslukostnaðinum verður broytt, so sølukostnaðurin og flutningskostnaðurin ikki telja við í uppgerðina av framleiðslukostnaðinum. Framleiðslukostnaðurin skal eisini gerast upp triðja hvørt ár og prístalsviðgerast árliga eftir vanliga prístalinum, ístaðin fyri sum nú, at framleiðslukostnaðurin verður settur tvær ferðir um árið. Tað fer

at lætta um umsitingina av skipanini og sannlíkt eisini at minka um árligu sveiggini í framleiðslukostnaðinum.

Hildið verður fast um, at tvey prosent av inntøkunum frá gjaldinum fara til kommunurnar, og eitt prosent fer til gransking í aling í Føroyum.

Nýggi serskatturin verður 8 prosent av yvirskotinum hjá alifeløgunum. Tað ber við sær, at alifeløgini rinda ein eyka serskatt av skattskyldugu inntøkuni hjá feløgunum frá smoltframleiðslu til sjógvaling og tøku. Farið er undir fyrireikandi lóggávuarbeiðið, og lóggávan um serskattaskipanina verður eftir ætlan borin Løgtinginum tíðliga í heyst.

Semjupartarnair halda tað vera rætt at samtykkja og avgreiða broytingarnar í tøkugjaldinum beinanvegin, og so leggja uppskotið um serskatt fyri Løgtingið seinni í ár. Orsakirnar eru serliga tvær. Í fyrsta lagi vilja semjupartarnir vísa, at hetta er ein semja sum heldur, og at alifeløgini kunnu virka eftir henni beinanvegin. Í øðrum lagi vilja semjupartarnir ikki, at tøkugjaldsstigin skal vera ein forðing, tá langtíðar sáttmálar fyri næsta ár skulu gerast í heyst.

Í tvørpolitiska semjuskjalinum, sum semjupartarnir undirskrivaðu í Tinganesi tann 26. mars í ár, vóru semjupartarnir samdir um, at tillagingar og broytingar kunnu gerast, um allir semjuflokkarnir eru samdir um tað. Undir nevndarviðgerðini var eisini semja um, at onkrar nágreiningar skulu gerast í ávísum ásetingum í uppskotinum. Talan er í høvuðsheitum um at broyta og konkretisera einstakar orðingar, so møgulig ivamál ikki standast um lógarøkið.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 2*. Sum alivinna eftir stk. 1 verður roknað virksemi á smoltstøðum, aling av fiski á sjónum og kryvjing á landi."

2. Í § 2, stk. 1, verður "alifiski" broytt til: "alilaksi"

3. Í § 2, stk. 2, verður "alifiski" broytt til: "alilaksi"

4. Í § 3, stk. 3 verður "alifiski" broytt til: "alilaksi"

Viðmerkingar:
Til nr. 1
Ásetingin lýsir, hvat er at meta sum alivinna sambært uppskotinum. Sum alivinna verður roknað alt virksemi í sambandi við aling, frá og við virksemi á smoltstøðum og fram til fiskurin verður kruvdur. Virksemi aftaná hetta, t.d. víðari tilvirking av kruvda fiskinum, er ikki at meta sum alivinna sambært uppskotinum.


Til nr. 2-4
Fyri at ivi ikki skal standast um lógarøkið, verður orðið "alifiski" broytt til "alilaksi".

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Árni Skaale og Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Havbúnaðarfelagið hevur í sínum hoyringarskrivi og á hoyringarfundunum harliga frámælt at seta fyriliggjandi uppskot í verk. Trupulleikarnir eru fleiri.

Uppskotið tekur ov nógv inn, tá inntjeningin er lág.
Úr hoyringarsvarinum frá Havbúnaðarfelagnum hava vit niðanfyristandandi mynd:




Myndin vísir, at alivinnan fer at gjalda munandi meir í skatti við hesum uppskotinum enn við verðandi skipan, tá inntjeningin er lág.

Ikki fyrr enn yvirskotið er oman fyri á leið 30 krónur pr. kg, verður skatturin lægri enn í verandi skipan.

Vit síggja, at um søluprísurin nærkast kostprísinum, kunnu alarar fara at gjalda 60%, 80% og upp í 100% í tøkugjaldi og serskatti.

Annar trupulleikin er, at semjan millum avtalupartarnar skal tryggja, at verandi leistur skal vera galdandi í minst 8 ár. Tí er ein skipan, sum ikki tekur hædd fyri, at inntjeningin kann vera lág, ein sera váðafull skipan fyri vinnuna.

Vinnan hevur áhaldandi víst á trupulleikarnar við atferðarstýring við tøkugjaldsskipanini. Roknað verður við, at umleið 80% av tí serligu inntøkuni frá alivinnuni kemur frá tøkugjaldinum og 20% frá

serskattinum. Tá tøkugjaldsparturin er so stórur, sum í hesum uppskotinum, so er einki at ivast í, at trupulleikin við atferðarstýring framvegis ger seg galdandi.

Atferðarstýringin kann fara at merkja, at alivinnan verður meir afturhaldandi við teimum meira váðafullu íløgunum. Hetta er sera harmiligt, tí tað eru hesar íløgurnar, sum veruliga menna, og hava ment, føroysku alivinnuna til tað støði, hon er á í dag.

Ein av alifyritøkunum hevur longu nú sagt 140 fólk úr starvi. Grundgevingin var, at óvissan, sum tøkugjaldið gevur, ger, at tað ikki loysir seg at gera langtíðar søluavtalur.

Vinnan hevur eisini víst á, at talan er ikki um, um hon skal gjalda ella ikki. Talan er bara um, hvussu hon skal gjalda.

Minnilutin er tí av teirri fatan, at tað einasta rætta er, at gjørd verður ein skipan, har øll serskattingin av alivinnuni verður løgd oman á verandi partafelagsskatt.

Minnilutin mælir til at fella uppskotið, samstundis sum heitt verður á landsstýrismannin um at koma við eini skipan, sum er grundað á partafelagsskatt.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum til at fella uppkotið.

**Vinnunevndin, 14. mai 2024**

| | | |
|---|---|---|
| Erhard Joensen<br>formaður | Annika Olsen<br>næstforkvinna | Eyðdis Hartmann Niclasen |
| Jørgen Niclasen | Árni Skaale | Uni Holm Johannesen |
| | Karlot Hergeirsson | |